# Skrivstovuhølir til leigu



Í bygningi okkara á Argjum hava vit 150 m² skrivstovuhølir til leigu frá 01. jan. 2002.

Hølini eru ljós og rúmlig við sera góðum útsýni yvir Nólsoyarfjørð, edv- & telenet er í hvørjum rúmi. Hølini hava egna inngongd og atgongd til køk. Vitja heimasíðu okkara www.eltele.fo fyri at síggja hølini. Áhugað kunnu ringja ella koma inn á gólvið mán.-frí 8.00-17.00.

el & tele

**Tel. 354 354**

---

*P/F Frants Restorff*

## Vit sóknast eftir fólki til fast starv til handilin

Arbeiðstíðirnar eru hesar:
kl. 06.00–13.00, kl. 13.00–19.00
kl. 19.00–23.30. Allar dagar í vikuni.

***Pf. Frants Restorff***
Tórsgøta 13 · Tlf. 311060
Postsmoga 41 · 110 Tórshavn

frants restorff

---

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

# Limafundur

verður í hølunum á Áarvegnum **mánakvøldið 12. november kl. 20.00.**

Á skránni verður fólkatingsvalið. Valevni verða við.

**Nevndin**

---

# HT-open 2001

Opin talvkapping verður í hølum Havnar Telvingarfelags komandi tvær vikurnar.

| | | |
|---|---|---|
| 1. umfar: | 12/11-2001 | kl. 18.00 |
| 2. umfar: | 13/11-2001 | kl. 18.00 |
| 3. umfar: | 14/11-2001 | kl. 18.00 |
| 4. umfar: | 15/11-2001 | kl. 18.00 |
| 5. umfar: | 19/11-2001 | kl. 18.00 |
| 6. umfar: | 20/11-2001 | kl. 18.00 |
| 7. umfar: | 21/11-2001 | kl. 18.00 |
| 8. umfar: | 22/11-2001 | kl. 18.00 |
| 9. umfar: | 23/11-2001 | kl. 18.00 |

| | | |
|---|---|---|
| Virðislønir: | Nr. 1: | 3000 kr. |
| | Nr. 2: | 2000 kr. |
| | Nr. 3: | 1000 kr. |

Besti unglingur: 1000 kr.

Kappingin er ratað.

Tíðin er 2 tímar til 40 leikir og síðani 1/2 tími til rest. Luttøkugjaldið er 150 kr fyri vaksin og 50 kr. fyri unglingar.

Limir Havnar Telvingarfelags, ið hava goldið limagjald, luttaka ókeypis.

**Havnar Telvingarfelag**

---

## Vágs Javnaðarfelag

### Ársaðalfundurin

verður
**leygardagin10. nov. kl. 18.00**
**í Matmøðrafelagshúsunum.**

**Vágs Javnaðarfelag**

---

Útbjóðing

**Umsitingarskipan og rakstur av .fo økisnøvnum á internetinum**

Feløg, stovnar og onnur áhugað kunnu geva tilboð upp á at menna eina umsitingarskipan og at reka umsitingina av **.fo** økisnøvnum vegna FO-ráðið. Útbjóðingartilfar við kravfestingum fæst við at venda sær til *Vinnuhúsið*, tlf: 311864, e-postur: fag@industry.fo. Útbjóðingargjaldið er 2000 kr.

Mikudagin 14. november 2001 kl. 15 verður kunnandi fundur fyri teimum, sum hava fingið útbjóðingartilfar. Tilboð skulu vera Vinnuhúsinum í hendi mánadagin 19. november 2001.

*FO-ráðið* er sett á stovn av Vinnumálastýrinum og KT-felagnum við tí endamáli at umsita økisnøvn (domain names) á landøkinum **.fo** á internetinum.

---

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** VW Golf 1,6 diesel, 3 hurðar.
**Árg.:** 1985
**KM.:** 238.369

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Esmar Simonsen, Kambsdalur, 530 Fuglafjørður.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Tlf. 373890
Fax.nr. 373117
Mobil tlf. 224859
at hitta millum kl. 08[00]–10[00]
Magnus E. Joensen, sýnsmaður

---

## Til allar heilsatstøðarar, sum eru limir í Almanna- og Heilsrøktarafelagnum

Pallbroðsfundur verður á Hotel Hafnia mánadagin 12/11 kl. 15.30

**Við á fundinum verða:**
Marin Vang, røktarleiðari, Landssjúkrahúsið.
Elspa Lútzen, leiðari, Ellis- og røktarheimið, Klaksvík.

Vinarliga
**Almanna- og Heilsurøktarafelagið**

---

# Kunngerð

**Tað verður hervið gjørt kunnugt, at atkvøðugreiðslan til fólkatingsvalið týsdagin tann 20. november 2001 verður á kommunuskrivstovuni í Leirvík.**

**Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 09.00 fyrrapartin og heldur fram til kl. 20.00 og so leingi veljarar møta uttan steðg.**

**Valkort verða send øllum, ið sambært vallistan hava valrætt í Leirvíkar Kommunu.**

Valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna. Veljari, sum ikki hevur fingið valkort, ella sum fær valkort við villum í, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt, men annars til og við valdagin.

**Brævatkvøður**
Tey, ið av ymsum orsøkum heldur ynskja at velja við brævatkvøðu á fólkayvirlitinum (kommunuskrivstovuni) ella heima, mugu boða kommunuskrivstovuni frá. Seinasti dagur fyri brævatkvøðugreiðslu er leygardagin tann 17. november 2001.

**Leirvíkar Kommuna**

---



# Kunngerð

Tað verður her gjørt kunnugt, at fráboðaða fólkatingsvalið fer fram
**týsdagin tann 20. nov. 2001**
**í skúlaauluni við Gøtugjógv.**

Atkvøðutíðin:
verður
**frá kl. 9.00 og til kl. 20.00**

og verður tá valið endað, so skjótt eingin veljari kemur fram til valavgreiðslu, hóast áheitan.

Brævatkvøður
Tey, ið av ymsum orsøkum ynskja heldur at velja við brævatkvøðu á fólkayvirlitinum (kommunuskrivstovuni) ella heima, verða biðin um at boða kommunuskrivstovuni frá innan fríggjadagin tann 16. nov. 2001 kl. 15.00. Seinasti rættstundis dagur fyri brævatkvøðugreiðslu er tó leygardagin tann 17. nov. 2001.

Valkort
Valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna. Hesi verða nú send út við postinum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella sum fær valkort við villum í, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt, men annars til og við valdagin.

***Minnist vinarligast til at hava valkortið við á val.***

Gøtu Kommuna

---

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Læknaskrivari til Eygnadeildina

Fast hálvtíðarstarv sum læknaskrivari á Eygnadeildini er leyst at søkja til setan frá 1. januar 2002 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir sambært sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Kára Holm, eygnalækna, telefon 313540, lokal 172.

**Umsóknarfreistin er 26. november 2001 kl. 12.00.**

Skivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

---

**Almanna- og Heilsumálastýrið**

# Sjúkrahússtjóri Landssjúkrahúsið

Starvið sum sjúkrahússtjóri fyri Landssjúkrahúsið, Tórshavn verður við hesum lýst leyst til setan 1. januar 2002 ella eftir nærri avtalu.

Landssjúkrahúsið verður fyrisitið av einari sjúkrahúsleiðslu, sum er mannað við sjúkrahússtjóra, sjúkrarøktarstjóra og læknastjóra, har sjúkrahússtjórin mótvegis Almanna- og heilsumálastýrinum hevur endaligu ábyrgdina.

**Uppgávurnar verða í høvuðsheitum at hava:**
- ábyrgd fyri ráðlegging, raðfesting, ígongdseting og samskipan av arbeiðsuppgávunum á sjúkrahúsinum
- ábyrgd fyri støðugari menning á sjúkrahúsinum, soleiðis at sjúkrahúsið støðugt tillagar seg tørvinum hjá sjúklingunum og broytingunum í treytunum hjá sjúkrahúsinum
- ábyrgd fyri gerð av uppskoti til fíggjarætlan
- ábyrgd av at góðkend fíggjarætlan verður hildin
- ábyrgd fyri at hagtøl yvir virksemi á sjúkrahúsinum verða fingin til vega
- ábyrgd fyri at sett verða mál fyri sjúkrahúsið innan kanningar-, viðgerðar-, og røktarøki, umframt fíggjar- og starvsfólkaligu økini í trá við tey mál og stevnumið, sum verða ásett í Almanna- og heilsumálastýrinum
- samstarv við onnur sjúkrahús, primeru heilsutænastuna, útbúgvingarstovnar og aðrar almennar stovnar til tilknýti til almanna- og heilsuøkið.

**Ynskiligt er við umsøkjara sum lúkar niðanfyrinevndu krøv:**
- útbúgving frá hægri lærustovni
- áhuga og kunnleika til heilsuverkið og heilsubúskap
- leiðsluroyndir helst frá almenna arbeiðsmarknaðinum.
- góð leiðslu- og samstarvsevni.
- mennandi leiðslustíl
- vitan um tær treytir sum eru galdandi í einari politiskari fyrisiting
- evni at seta í verk fyriskipanir
- kunnleika til fíggjarstýring

**Lønar- og setanartreytir:**
Setanarøkið er Almanna- og heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við tænastu á Landssjúkrahúsinum. Næsti fyrisetti er aðalstjórin í Almanna- og heilsumálastýrinum.
Møguleiki er fyri at velja um talan skal vera um tænastumannastarv ella áramálssetan í 5 ár við serligum sáttmála.
Samráðingar fara í løtuni fram um lønina.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aibritt á Plógv, aðalstjóra tlf. 30 40 50, ella Jóanis Erik Køtlum, sjúkrahúsleiðara tlf. 31 35 40.

**Umsókn:**
Umsókn við C.V. og avriti av neyðugum skjølum skal sendast til:
Almanna- og heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 7. desember 2001 kl. 12.00.

---

The Windsmith
v/ John S. Müller



**Ring og royn**
**eitt blásaraljóðføri við ráðgeving frá útbúnum og royndum fakmanni**

**Søla**
**Nýggj Yamaha blásaraljóðføri tøk**

**Tænasta**
**3 mðr. ókeypis fínstilling av ljóðførum, sum latin eru av blásaraverkstaðnum við Marknagilsvegin 18**

*fartlf. 219721 · e-mail: windsmit@post.olivant.fo*

---

# Eykapolitistur

Eitt starv sum eykapolitistur hjá politinum í Miðvági er leyst at søkja.

Tænastutíðin er 6 tímar um vikuna – vanliga um kvøldið. Samsýningin er í løtuni 2.939,48 kr. um mánaðin.

Umsóknarblað fæst á politistøðini í Miðvági.

Umsókn verður at senda til Føroya Landfúta, postboks 3018, FO-110 Tórshavn innan 23. november 2001.

**Føroya Landfúti**
*Tórshavn hin 8. november 2001*
M. Nepper-Christensen


www.sosialurin.fo